## Smyril kemur ikki á Havnina

Enn er ógreitt hvussu verður, tá nýggi Smyril kemur til landið. Á Strandferðsluni vita tey enni ikki. hvar hann fer at leggja at ella hvørji tiltøk verða.

Avgerð er tó tikin um, at Smyril ikki kemur á Havnina, og tí er longu greitt, at einki hátíðarhald og eingin móttøka verður í Havn sunnudagin.

Innbodna móttøkan í Suðuroy er somuleiðis avlýst.

Katrin West:

# Hetta líkist ongum

**Tað verður bara tosað, eingin ger nakað við tað, at arbeiðssteðgir altíð ganga út yvir suðuroyingar, sigur Katrin West av Tvøroyri, sum strandaði í Havn hósdagin vegna arbeiðssteðgin**

ARBEIÐSSTEÐGUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Hetta hoyrir ongastaðni heima, at eitt verkfall altíð skal ganga út yvir suðuroyingar.

Tað heldur Katrin West, sum hósmorgunin fór eitt ørindi til Havnar. Hon hevði ætlað sær suður aftur seinnapartin, men tað varð av ongum, tí tá var Smyril I lagdur vegna arbeiðssteðgin hjá Strarvsmannafelagnum.

– Eg havi trý smá børn, sum fóru í dagrøkt í morgun. Tað hava serliga røkt fyri neyðini, tí tvey teirra hava sukursjúku og skulu hava serligan kost, segði Katrin West við Sosialin.

Hon hevði tá biðið sær innivist í Havn og mátti tosa við ommur um at heinta og røkja børnini.

Hon var - eins og nógvir suðuroyingar - rættuliga forargað av, at arbeiðssteðgir altíð ganga út yvir farleið teirra til meginøki. Hon heldur, at manningin á Smyrli alt fyri eitt átti at verði sett sum tænastufólk, so farleiðin varð tryggjað.

– Hetta skal eitast at vera eitt framkomið samfelag, men tað kann eg als ikki



taka undir við. Hetta eitt undarligt føroyskt fyribrigdi, at tað verður bara tosað um, hvussu tvørligt tað altíð er hjá suðuroyingum í slíkum støðum, og at Smyril ikki skal rakast av verkfalli, men eingin ger nakað við tað, segði Katrin West, sum fríggjamorgunin slapp suður við trolaranum Brestir, meðan bilurin má bíða í Havn, til partarnir á arbeiðsmarknaðinum sáttast um semju.


# Søluráðgevi til FT Samskifti

Vegna umskipan av Føroya Tele og ynski um at leggja størri dent á kundasamskifti og nøgdsemi verður søkt eftir ráðgeva til FT Samskifti.
Ráðgevin vit sóknast eftir, skal taka sær av tørvsgreining, samskifti um og sølu av tænastum og samskiftisútgerð frá FT Samskifti.
Málbólkurin fyri allar ráðgevarnar eru vinnukundar í øllum landinum og tí kann væntast nógv ferðing.

Arbeiðsuppgávurnar eru:
At arbeiða í einum toymi til tess at veita vinnukundum holla ráðgeving um samskiftisloysnir og útgerð og annars at veita allar tær tænastur, FT Samskifti veitir kundum sínum.
Stórur dentur verður lagdur á at hava eitt gott og støðugt samskifti við kundar okkara og at geva teimum eina munagóða tænastu á høgum støði.

Førleikar og royndir hjá umsøkjarum:
- hava royndir við søluarbeiði og kunna vísa á úrslit
- hava persónligan og álitisvekjandi myndugleika
- hava kunnleika til og/ella áhuga fyri kunningartøkni ella samskiftistøkni
- kunna taka nýggj stig og verða yrkismedvitandi
- vera skapandi og virkisfús/-ur og tora at taka avgerðir
- samskipanar- og/ella leiðsluroyndir eru ein fyrimunur
- hava koyrikort

Tann ið sett/-ur verður, kemur at arbeiða í einum spennandi og virknum umhvørvi, har sera stórur dentur verður lagdur á at veita góða og viðkomandi ráðgeving til kundarnar, samstundis sum innanhýsis samstarv við upplæring, sparring og vitanardeiling er ein partur av uppgávunum. Arbeiðsstaður verður í Klingruni í Hoyvík og/ella út frá økisskrivstovunum í Runavík ella Klaksvík.

Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag og verður at seta sjkótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið frá Aksel Haraldsen tel 303371 ella Jákupi Danielsen tel 303321.

Umsóknir til størvini skulu verða Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi 21. oktober 2005 og skulu sendast til

P/f FT Samskifti
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
FO-110 Tórshavn

# Starvsfólk til Telebúðina í Havn

Søkt verður eftir fólki til Telebúðina í Tórshavn skjótast gjørligt.

Telebúðin í Tórshavn er ein av seks telebúðum kring landið, ið selur vanligar telebúðarvørur umframt samskiftistænastur.

Talan er um eitt avbjóðandi starv, ið gevur eina góða vitan og lærdóm um samskiftisvørur og tænastur. Arbeitt verður í einum krevjandi og mennandi umhvørvi, har stórur dentur verður lagdur á góðan handilsskap og á at veita eina skjóta og munagóða tænastu.

Førleikar og royndir hjá umsøkjarum
- evni at seta seg inn í nýggja tøkni
- kunnleika um kunningartøkni og/ella samskiftistøkni
- dirvi og áræði at taka tøk og røkka ásettum málum
- evni at samstarva við onnur í fyritøkuni

Vit rokna við, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving og/ella royndir.

Telebúðin er opin allar vanligar handilstíðir og verður arbeitt í skiftum við hini starvsfólkini í handlinum.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag galdandi fyri Føroya Tele og Starvsmannafelagið og verður at seta skjótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið frá Hildibjarti Hansen á tel 303342 ella Jákupi Danielsen tel 303321.

Umsóknir til størvini skulu verða Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi 21. oktober 2005 og skulu sendast til

P/f FT Samskifti
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
FO-110 Tórshavn

"Far ikki eftir kendum gøtum. Far heldur har, sum eingin gøta er og legg eina slóð"

- Ralph Waldo Emerson



**FT Samskifti**
**P/F FT Samskifti er dótturfelag hjá Føroya Tele. Í nýggja felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-økið og øll støðarútgerð fyri fastnetstelefoni og breiðband. Broytingin til nýggja dótturfelagið er við til at tryggja eins treytir fyri kappingarneytarnar á marknaðinum. Hesir nýggju karmarnir geva nýggjar møguleikar at veita betri og bíligari tænastur til kundarnar. Richard Mortensen er stjóri í FT Samskifti. Í felagnum starvast 105 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum "Føroya Tele"**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*